www.oljan.fo

Jan Müller 24 - 07 - 2012

Føroyar møguliga Kina sum oljugranna

Um almenna kinesiska oljufelagið CNOOC sleppur at keypa kandiska oljurisan, Nexen, so verða kinverjar partur av týðandi oljuleiting skamt frá føroyska markinum. Almenna kinesiska oljufelagið CNOOC hevur nevniliga bjóðað 80 milliardir krónur fyri tað stóra kanadiska oljufelagið NEXEN. Um keypið gerst veruleiki verður hetta størsta útlendska keypið, sum eitt kinesiskt felag nakrantíð hevur gjørt. Enn er tó ikki vist, um keypið verður til veruleika, tí kanadiska stjórnin skal góðkenna tað. Tó hevur nevndin í felagnum góðtikið eina sølu, sum nú skal til viðgerðar í stjórnini. Talsmaður fyri CNOOC, sum longu arbeiðir saman við Nexen í fleiri verkætlanum, sigur við BBC, at eitt møguligt keyp/yvirtøka av tí kanadiska felagnum fer at økja um goymslurnar við 30%. Hetta verður triðja kinesiska íløgan í Kanada síðani 2005, tá CNOOC keypti 16,7% av MEG Energy, sum stendur fyri framleiðslu av oljusandi. Í fjør keypti kinesiska felagið enn eitt kanadiskt felag, sum er við í framleiðsluni av oljusandi, Opti Canada. "CNOOC roynir at keypa upp útlendsk oljufeløg, nú heimligu goymslurnar eru so avmarkaðar, sigur Yan Shi, kinverskur oljuviðmerkjari. Kortini kann kanadiska stjórnin, er íløgan omanfyri 1,5 milliardir krónur leggja veto móti slíkum keypi metir hon, at tað gongur ímóti kanadiskum áhugamálum. Í 2005, tá CNOOC royndi at keypa upp amerikanska Unocal varð keypið steðgað av politisku skipanini. Tað gerst annars alt meira vanligt, at almennu oljufeløgini í fjareysturi, eitt nú tað kinesiska og tað koreanska, keypa upp ella partar av oljufeløgum í Vesturheiminum fyri at tryggja sær nýggjar oljugoymslur. Um keypið av Nexen gerst veruleiki, so fáa eisini Føroyar ein nýggjan oljugranna fyri eystan. Nexen er nevniliga við í fleiri leitiloyvum vestan fyri Hetland og er eisini við í tí spennandi boringini við markið, North Uist, har BP er fyristøðufelag og har eisini tað føroyska Faroe Petroleum er við. Vit eru annars farin at síggja

alsamt fleiri asiatisk oljufeløg keypa seg inn í loyvi í Norðureuropa. Føroyska Faroe Petroleum hevur í eina tíð samstarvað við tey bæði japonsku oljjufeløgini Idemitsu og Cieco. Eisini suðurkoreansk oljufeløg vísa áhuga fyri oljuleiting her norðuri. Mynd Stena Carron, sum borar North Uist brunnin skamt frá føroyska markinum. Kanadiska oljufelagið Nexen, sum almenna kinesiska oljufelagið hevur lagt boð inn uppá, er við í hesum brunninum saman við m.a. Faroe Petroleum.